Á kvøldartíð ein vinur
D dur

```
        D                                              A
1/6: Á kvøldartíð ein vinur stillur stendur
                                                  _D
og bankar á tíns hjarta stongdu dyr;
                                                          G
hann stendur enn, hann ei sær frá tær vendir,
          A                                       D
hann bankar enn í dag sum ofta fyrr.
```

2/6. Hvør er hann, sum ei nakað stríð man skýggja,
sum bankar enn og ikki frá tær fer,
og helst í løtum, tá tú greitt manst síggja,
at alt so tómt og gleðileyst er her?

3/6. Hvør er tað? Á, tað signað er at siga:
Tað Jesus er, sum førdi tína sak!
Hann niður til várt myrkur vildi stíga
at frelsa tað, sum var av synd eitt vrak.

4/6. Trong var hin leið, sum her hann mátti ganga;
vár synd, vár straff, alt fell á hann í senn,
til hann á krossi deyður mátti hanga;
tó, deyðan vann hann, og hann livir enn.

5/6. Av kærleika til tín hans hjarta brennur,
hann vil teg frelsa nú, tí bankar hann;
og um ei her tín frelsara tú kennir,
ei allar ævir sál tín frelsast kann.

6/6. Lat upp, mín vinur, nú, og lat hann stíga
í hjartað inn og altíð búgva har!
Hann teg frá tínum syndum brátt skal fría
og sannan frið og gleði geva tær.